Scansat/TV3

Fríggjadagin kl. 19.00:

Magnum P.I.

Ongantíð aftur

Lena og Saul Greenberg eru eini gomul jødisk hjún, sum livdu eftir aftan á seinna heimsbardaga. Tey hava búsett seg á Hawaii og hava ein handil har. Men ein dagin umbroytist tilvera teirra. Onkur er eftir teimum, júst sum fyrr í tíðini. Stutt eftir verður Saul rændur og Magnum fer at leita eftir honum.

Fríggjadagin kl. 22.03:

Caught in The Draft

Amerikanskur filmur frá 1941. Bob Hope er sjónleikari og er nú í herinum. Hetta elvdi ein skemtiframførsla hjá honum til. Hann er bangin fyri skotum og kemur altíð í trupulleikar, og oman á alt er hann vorðin forelskaður uppi í dóttir herovastan. Hon er eisini góð við hann, men kundi ikki hugsað sær at gift seg við nøkrum, sum ikki er ein hetja. Tí fer hon í holt við ætlanir at gera hann til hetju.

Leygardagin kl. 13.55:

Lívið um tey 30

Hope og Michael verða ólukkulig, tá ið barnið, tey skulu fáa, doyr. Hope verður heima og letur sum alt gongur, sum tað eigur. Men Michael fær sær nýtt starv. Ellyn og Elliot royna eftir førimuni at hjálpa teimum, men tað er torført, tí tey vilja ikki tosa um sorgina.

Leygardagin kl. 23.45:

Alfred Hitchcock

Ray og Meg eru nýgift og á veg til hotellið, tá ið bilurin hjá teimum verður í ólagi. Ein fremmandur kemur og bjóðar sær at gera bilin aftur, men tá ið klæðini hjá honum dálkast, verður hann í øðini og lovar at drepa tey. Tey skunda sær higani og fara á hotellið, men har er tann fremmandi eisini . . .

Sunnudagin kl. 16.25:

Robinson í Roslagen

Svenskur filmur frá 1948. Alfred er bátabyggjari á eini oyggj í Roslagen og giftur við Katrinu, sum eigur ein lítlan handil. Alfred sníkir seg at gera sær eitt heimabryggjari, men hetta spreingist í luftina og við hesum eisini úthúsið. Katrina gerst í øðini, og Alfred ger av at rýma á eina óbygda oyggj, júst sum Robinson Cruse, at liva í friði. Hann fer avstað við fullum báti av mati og nøkrum

Sunnudagin kl. 18.30:

The Golden Girls

Fyrri maður Dorothy, Stan, skal giftast — fyri triðju ferð. Samstundis verður Sophia ógvuliga sjúk og fer á sjúkrahúsið. Har hittir Dorothy Stan í biðirúminum. Eftir eina langa óróliga nátt saman uppdagar Dorothy, at hon framvegis elskar Stan og vil hava hann aftur. Men tað er lættari sagt enn gjørt, tí hann skal giftast um fáar dagar . . .

Sunnudagin kl. 19.00:

Mr. Roberts

Amerikanskur filmur frá 1955. Søgan er frá seinna heimsbardaga, umborð á handilsskipinum U.S.S. Reluctant, sum liggur fyri akkeri við eina lítla suðurhavsoyggj, meðan onnur skip eru í kríggi. Ein umborð, Roberts, tímir illa at liggja stillur. Hann vil hava okkurt at gera, men skiparin vil ikki. Ein dagin fáa teir boð um at fara til oynna Elysium í Polynesien eftir einari last, og manningin gleðir seg . . .

Mánadagin kl. 20.03:

Paradise Alley

Sylvester Stallone

Amerikanskur filmur frá 1978. Søgan er frá 1946 í einum fátækum býarparti í New York. Cosmo Carboni er sum vanligt úti eftir at fáa pengar — heiðurliga ella við sviki — og endar í klubbanum Paradise Alley, har altíð er sera lívligt.

Mánadagin kl. 22.13:

Callan

Janet Lewis, einkja eftir fyrra uttanríkisráðharran, verður biðin at vera við í einari sjónvarpssending um lívið hjá manni hennara. Tað er Rene, sum ger hesa dokumentarsendingina. Callan fær boð um at steðga hesum, tí kanska kemur hon við onkrum loyniligum upplýsingum. Eftir at synir hennara eru hóttir við lívinum, ger Janet av ikki at luttaka í sendingini, men Rene gevur seg ikki . . .

Týsdagin kl. 19.03:

Chato's Land



Charles Bronson

Amerikanskur western frá 1972. Chato er ein erpin og djarvur apachekrigsmaður, sum roynir at tillaga seg eftir løgna lívinum, tann hvíti maðurin noyðir hann at liva seinast í 1870. So drepur Chato sheriffin, eftir at hava verið uppøstur av honum, og flýggjar. Saman við einum »squaw« fer hann, men hann verður jagstraður . . .

Týsdagin kl. 22.03:

Mike Hammer

Mike verður biðin at finna sjefarhundin Max, sum er horvin á gátuføran hátt. Max, sum er vandur blindhundur, er hundurin hjá tí 12 ára gomlu, blindu Jennifer Decker, sum er hjálparleys við ongum hundi. Mike roynir at finna hundin skjótast gjørligt, men so hvørvur Jennifer eisini, meðan hon er í skúla — rænd av sama manni, sum tók Max. Pápi Jennifer, sum er ríkur, frætti skjótt um loysigjaldið, 500 antitankmissilir — hann er vápnasmiður. Men FBI noktar honum at lata ránsmonnunum hetta, men Decker ger alt fyri at fáa dóttrina aftur á lívi.

Mikudagin kl. 16.00:

Skippy

Systir Matt, Evelyn, kemur at vitja — at tosa um skúlagongdina hjá Sonny. Hon heldur, at hann lærir ov lítið á Waratah og at Matt átti at latið hann farið á ein kostskúla. Í eini roynd at fáa hana upp á aðrar tankar, bjóðar Matt henni ein ríðitúr saman við Sonny, ein túr, sum verður øðrvísi, enn nakar hevði væntað.

Mikudagin kl. 19.00:

Pør í hjørtum

Góði vinur Jonathans, Walter Kiley, hevur alment ákært politikaran Adbury at hava tikið ímóti mutri, og hesin lovar at hevna seg. Kiley verður skotin á gøtuni og síðani fer drápsmaðurin í ein bil, sum hann heldur koyrir hann haðani. Men tað er Jonathan Hart, sum koyrir. Hann bíðar eftir at Max skal koma aftur, hann hevur verið ørindi. Jonathan letst sum einki og koyrir drápsmannin heim. Í bilinum letur drápsmaðurin seg úr skortinum og Jonathan sær, at tað er ein kvinna. Hon fær illgruna um, at alt er ikki sum ætlað, tá ið tey steðga uttan fyri hjá Jonathan, har stendur Jennifer . . .

Mikudagin kl. 21.30:

Marilyn

Marilyn Monroe

Marilyn Monoe doyði í 1962, og seinastu tíðina gekk ikki so væl hjá henni. At enda varð hon koyrd úr filminum »Something' s Got To Give«. Hesin filmurin snýr seg um lív hennara teir seinastu mánaðirnar.

Mikudagin kl. 22.33:

Benson

Øll hjá Gattlings guvernøri eru við í fyrireikingunum til brúdleypið hjá Marcy og Dan, og alt gongur væl, til mamma Marcy kemur. Hon hevur sínar ætlanir og veit altíð best.

Hósdagin kl. 20.00:

21 Jump Street

Hetta er ein partur av sendirøðini »21 Jump Street«, sum verður sýnd í heyst. Sendirøðin byggir á veruleikan. Hon er um nakrar ungar politistar í USA, sum geva seg út at vera studentar fyri at finna útav ymiskum, sum gongur fyri seg innan skúlagátt. Har teir halda til, eitur 21 Jump Street, og leiðari teirra er Kaptein Fuller.

Hósdagin kl. 22.03:

Mike Hammer

Rocksangarinnan Jaime Jinx kemur í lívsvanda, tá ið hon syngur til jarðarferðina hjá einum góðum vini og starvsfelaga, tí fleiri halda hana hava okkurt við tað gátuføra andlátið at gera. Hon verður bangin og loypir í ein bil og fer beinleiðis á skrivstovuna hjá Mike Hammer — við tveimum byrsumonnum í hølunum. Mike verjir hana, men skrivarin hjá Mike verður skotin.

Eftir at hava hoyrt søguna hjá henni, lovar Mike at hjálpa Jaime. Men hann hugsar øðrvísi, tá ið hann uppdagar, at hon hevur logið fyri honum, hvussu hon kendi bústaðin hjá honum. Men sannleikin er meira ótrúligur enn lygnin, tí Jaime er dóttir Mike.